

MYNDIR: BIRGIR WAAG HØGNESEN

*Eydna á Rógvi Simonsen stýrir uppboðssøluni úr vindeyganum*

# Eydna selir haruhagar

**HARUSKJÓTING** ER VANLIGA EIN **MANNFÓLKAVERÐ**, MEN Í VESTMENNA ER TAÐ **EYDNA Á RÓGVI SIMONSEN**, SUM SELIR **HARUHAGARNAR**



**HARUHAGAR**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Stórt tal av mannfólkum savnast í túninum í Vestmanna, tá haruhagarnir verða seldir, men í vindeyganum er tað eitt konufólk, sum stýrir uppboðssøluni.

Eydna á Rógvi Simonsen heldur uppboðið, og tað kennist púra natúrligt fyri hana.

– Eg havi verið nógv við at selja haruhagar. Abbi mín og pápi mín hava selt hagarnar, og eg og systur mín hava skift um at skriva fyri teir. Okkum dámar væl hesa atmosferina, tá hagarnar verða seldir, og fólk standa og bjóða. Tað hevur verið ein partur av okkara lívi í nógv ár, sigur hon.



*Tað eru bara menn, sum bjóða upp á haruhagar í Vestmanna*

Men haruskjótingin er í stóran mun ein mannfólkaverð.

– Eg hugsi um tað viðhvørt. Tá eg hyggi út gjøgnum vindeygað, so síggi eg sjáldan meira enn eitt ella tvey konufólk at síggja, men tær bjóða ikki, sigur Eydna.

## Upp og niður

Prísinir fyri haruhagarnar í Vestmanna kunnu broytast nógv frá ár til ár. Góðar tíðir hava við sær, at kappingin um hagarnar verður størri, avbygdafólk koma til Vestmanna at bjóða, og so økist kappingin.

– Í 1997 fóru allir hagarnir fyri nøkur 40.000, men í 2005 fingu vit 145.000 krónur, sigur Eydna.

Í fjør var upphæddin aftur um tær 40.000, og í ár fingu tey nakað meira inn – einar 53.000 krónur.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **TAÐ HENDIR ØLLUM ØÐRUM**
4 INTERVIEW: **KÁRI Á RÓGVU**
8 TIPS: **BØKUR SUM PRÝÐI**
9 HEILSUSÍÐAN: **HVAT ER STOFFSKIFTI**
10 EYDNA SELIR **HARUHAGAR Í VESTMANNA**
11 90 SEKUND: **BOGI ANDREASEN**
12 ÚLVURIN KEMUR – **HVAT GERA VIT?**
14 TIL ARBEIÐIS: **EDITH Á HÁLVMØRK**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 REPORTASJA: **Á BLÁMAN Í FØROYSKUM UNDIRBUKSUM**
22 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **BARRACK OBAMA Í FJAREYSTRI**

## KLUMMAN



*Inna Törnroos*

# Tað hendir øllum øðrum...

Skrivaði eina grein í seinasta Vikuskifti um skotini í Malmø. Nú virkar tað, sum tey hava fingið fatur á manninum, og tað er gleðiligt!

Arbeiðið við greinini fekk meg at hugsa um harðskap, og hvussu óvanligt tað hóast alt er, at vit vera álopin, skotin ella niðursligin. Sjálvandi eru tað tey, ið hava verið úti fyri bæði einum og øðrum, men flestu okkara eru spard fyri harðskapi.

Tá man, sum eg, býr í einum stórbýi lesur man næstan dagliga um harðskap nærhendis, har man býr ella arbeiðir. Eg reageri sum tey flestu við at skjóta tað frá mær og hugsa "Tað hendir øllum øðrum - ikki mær".

Eg havi sum regul, at eg gangi ikki einsamøll úti í myrkri aftan á klokkan níggju um kvøldið. Tað haldi eg fast um, og er klokkan farin av níggju, er tað bussur, taksi ella súkklan, sum verður nýtt.

Nógvar vinkonur halda meg verða býttisliga og paranoida. Tær minna meg á - sum eisini er fakta - at flestu fólk verða harðskapsrakt av fólki, tey kenna, og ikki úti á gøtuni klokkan 21:05 eitt mikukvøld.

Hóast at eg havi búð í Føroyum, hevur hesin regul eisini verið partur av mínum gerandisdagi har. Tí faktum er, at hóast eg havi búð uttanlands í næstan 20 ár og í stórbýi størsta partin, so er tað í Føroyum, eg havi verið fyri bæði stuldri og álopi. Í stórbýnum havi eg ongantíð verið úti fyri nøkrum øðrum enn onkrum fullum manni ella narkomani, sum hevur roynt eitt sindur eftir mær í undirgrundini ...

Trúgvi hóast hetta ikki, at harðskapur og stuldur er serliga vanligur í Føroyum. Eg havi bara verið ein av hinum – ein av teimum, sum kemur út fyri tí óvanliga, sum tey flestu ikki uppliva.

Hvussu stórur tann parturin av okkum, sum veruliga hava upplivað stuldur ella harðskap, er, veit nokk ongin við vissu! Eg fór ikki víðari við mínum málum, og tað munnu verða nógv við mær, ið velja tað sama.

Hóast at eg gott kann liva uttan tær 300 krónurnar og við teimum bláu merkjunum, sum skjótt blivu burtur, so setur slíkt síni spor í sálina, og tey sporini hvørva tíanverri ikki eins lætt ella skjótt sum tey bláu merkini.

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Paul Watson / Pressumynd